# Mads Andrias Winther, undangongumaðurin

**Mads doyði bert 52 ára gamal í 1923. M.A. Jacobsen skrivaði millum annað um hann:**

Øll tey fyrstu árini var Mads Andrias Winther oddamaður (ungmanna) felagsins, og tað treivst væl undir hansara hondum. Hann elskaði ungdómin og dugdi sjáldsama væl at vera saman við teimum ungu, altíð í góðum hýri, fryntligur og skemtingarsamur, og so átti hann hetta barnsliga álvara, ið gjørdi tey ungu trygg og opinskárað. Hann var eingin røðari, men hansara bjarta lívsáskoðan, ið elvdi honum sjálvum ljósar vónir um framburð land og fólk, skygdi gjøgnum orð hansara og vermdi ungar sálir, og sjálvur yngdist hann upp í samveruni við teim ungu og kendi sær hvíld og ugga í ungdómsarbeiðnum. Á felagsfundunum var tað upplesturin av hinum skrivaða blaðnum Baldursbrá, ið elvdi mestan áhuga og stuttleika. Øllum var tað forkunnugt at hoyra móðurmálið nýtt í yrking og skaldsøguskriving. Og blaðið gjørdi tað, at flest øll máttu royna seg við penninum. Og merkiligt er, hvussu hugaðir limirnir vóru at skriva. Bløðini fylla seks stórar foliobøkur, ið nú eru til skjals á Landsbókasavninum. Hetta er ein stakmerkilig Havnarsøga frá árunum 1906-1912, skrivað av unga ættarliðnum í Havn, og nógv av hesum, ið her er skrivað, hevur skaldskaparligt og bókmentaligt virði.

Mads var føddur 23. november 1871 á Sandi og doyði 8. februar 1923. Hann var á sorinskrivaraskrivstovuni í eitt mannaminni.

Foreldrini vóru Elisabeth Marianna f. Mohr, Hoyvík og Niels Christoffer Winther av Sandi. Kona hansara var Sigrið Thorbjørg f. Mohr í Havn. Hann var tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin 1906-23. Fyrst fyri Suðurstreymoyar valdømi til 1918 og síðan fyri Sandoyar valdømi, tá ið hann var sýslumaður í Sandoyar Sýslu. Hann var limur í Tórshavnar býráð 1909-16 og formaður 1909-13. Hansara Úrvalsrit komu út í 1932. Mesta tilfar í hesi bók eru greinir, hann skrivaði í Baldursbrá.



*Mads Andrias Winther var eingin ársungi, men hann var eldsál í ungmannafelagnum*

# Dømi úr Baldursbrá




*Høvd á Baldursbrá, teknað av Petur Alberg*



*Hetta er eitt dømi um skriftina hjá Petur Alberg í Baldursbrá. Hon talar fyri seg*

*Tað er eingin ivi um, at tað finst nógv áhugavert tilfar í Baldursbrá, tá hugsað verður um øll tey megnarfólk, sum hava skrivað í blaðnum. Í hesum umfari er bert pláss fyri einum lítlum broti.*

*Í november 1907 situr Petur Alberg og skrivar eitt bræv, sum hann dagfestir í Tjørnuvík 26. mai 1972. Her letur hann brævskrivaran eita Bjørn og móttakaran eita Brand, og so spælir hann sær við, hvussu umstøðurnat fóru at vera í Føroyum 65 ár seinni. Brandur hevur búð í Amerika í 10 ár og er nú á vitjan. Vit endurgeva brot úr brævinum:*

## Góði vinur,

Tað er skomm av mær, at eg skal hava latið teg bíða so leingi at frætta frá mær, men eg havi havt so nógv at tikist við, síðan eg kom aftur til Føroyar, at eg neyvan havi fingið tíð at sovið og enn minni fingið tíð til at hugsa um teir, ið burturi eru. Eg vóni, at tú hevur fingið ta heilsu, sum eg sendi tær yvir til San Francisco yvir tann tráðleysa. Ferðin higar til Føroyar frá Chicago við ballónini gekk sera væl, undantikið, at vit tann dagin í storminum fingu eitt lítið brek í róðurgreiðirnar. Eg kom higar til Tjørnuvíkar við jarnbananum í Havn, og ætli eg at steðga her á hotellinum í tveir dagar."

Sum tann sjónleikarhugaði saknar hann teatur í Tjørnuvík, men á Eiði er tó eitt frálíkt, sum hann kann fara til.

"Meðan eg steðgaði í Havn, hevði eg tað so frágera gott, tað var valla, at eg kendi Havnina aftur, tó eg ikki hevði verið burtur í meira enn 10 ár. Har búgva um 75.000 fólk, og alt sær nýtt og moderna út. Teatur og variteir eru 1. klassa, og Tivoli kann sammetast við líknandi av sama slag aðra staðni.

Eitt kvøldið var eg í Ungmannafelagnum. Har las ein limur upp úr einari gamlari bók. Teir søgdu, at tað var felagsins fyrsta blaðbók. At hugsa tær til, hvussu lítið fólk kravdi tá. Nú kemur blaðið út, prentað sjálvsagt, hvønn dag og er nú felagsblað fyri øll ungmannafeløgini i Føroyum.

Tað stendur hart poltiskt stríð í hesum døgum, tí nýggj valg skulu vera til Føroya Ríksdag. Væntast, at sosialistarnir nú koma at eiga flest allar sessirnar.

Ja, her er nógv umbroytt, og tann gamli havnamoli, sum fyrr gekk frá Skansa út á Argir, er nú bygdur av nýggjum og gongur frá Hoyvík og suður á Glyvursnes. Men tað tørvar eisini, tí bæði er skipaflotin hjá føroyingum stórur, og so hava tey skipini, ið sigla til Grønlands og londini við Norðpólin uppløgu her og størri parturin vetrarstøðu.

Kirkjubøreyn er nú avvaksið við viðskóg, men tað hevur verið drúgt arbeiði.

Nú hoyri eg, at Amerikabáturin pípar 1. ferð. Tað er væl best, at eg fái endað hetta brævið. Vit síggjast aftur í Washington í heyst.

***Vinarlig heilsan***
**Bjørn**

## Næstu ferð

Í komandi Miðviku verður greitt frá ferðini hjá Niels R Finsen heim úr Grønlandi í 1939 við 250 útróðrarmonnum. Høvuðskeldan er Aksel Dalsgaard úr Skálavík. Aftaná verða fýra partar av spennandi tilfari um Daniel J. Danielsen, sum var trúboðari í Congo 1901-03

Sosialurin